# Menningartarnað miðpunkt á stuttligari familjustevnu

**FAMILJU-FESTIVALUR**
*Tíðindaskriv*

Vikuskiftið 21.-22. aug. skipar Tónleikatiltakið Teitis saman við Fimleikafelaganum Ljósið fyri familjufestivali í kommunuskúlagarðinum í havn, har tey menningartarnaðu og teirra mentan eru miðdeplinum. Navnið á fagnaðinum er Teitisfestivalurin og sipar tað til gleði, skemt og stuttleika, sum eisini er evsta endamálið við tiltakinum.

### Alt millum himmal og jørð á skránni

Tað verður fyrst og fremst á tónleikapallinum, at tey menningartarnaðu fara at gera seg galdandi, m.a. verður okkara egnu M's Blues Band og Ælabogin at framføra, umframt íslendski bólkurin »Blikandi stjørnur« og danski bólkurin ØPP (øl, pølser og popcorn). Ein listaframsýning við málningum, sum tey menningartarnaðu hava gjørt, er eisini partur av tiltakinum. Annars verða framførslur við Angelu & Hannibal, Absalon Áargarð, búktalara, karaokepallur til teirra, ið hava hug at royna seg sum sangstjørnu og dansur í tjaldinum seinni um kvøldið.

Karmur um tiltakið er í høvuðsheitum Kommunuskúlagarðurin, men ætlanin er seta hátíðardám eitt sindur oman í býin, - hetta valdast eitt sindur av orku og fíggjarligan stuðul. Eins og á ólavsøku verður umframt tónleik og list nógv annað til undirhalds og hugna, – har verða nevniliga køku- og bamsutombola, balónsøla, fiskibrunnur, ponyríðing, andlitsmáling, skreiði- og hoppiborgir og karusell. Eisini verður okkurt til teirra, ið ikki vilja sita við turra tonn, tí hugnalig kafé, har kaffi, te, vaflur, sodavatn, øl, tvíflísar, pylsur, poppkorn v.m. verða serverað, er eisini at finna í Kommunuskúlagarðinum hetta vikuskiftið.

Vónandi síggjast vit seinni í summar á stuttliga Teitisfestivalinum, sum vit ætla skal vera afturvendandi tiltak í august, sigur fyrireikararnir í tíðindaskrivi.

### Fakta um Teitis Festivalin

Endamálið við tiltakinum er fyrst og fremst at skapa ein fagnað fyri menningartarnað, sum gevur teimum høvi at vera saman um tónleik og list í einum tiltaki, sum tey sjálvi eiga.

Tónleikafagnaðurin varpar ljós á menningartarnað og teirra serligu gávur, og er ein møguleiki at vísa eina aðra síðu av menningartarnaðum, enn hana vit vanliga síggja. Samstundis er hetta er eitt gott høvi hjá teirra nærmastu og øðrum at hava tað stuttligt saman við menningartarnaðum hetta vikuskifti.

Ætlanin er at fáa menningartarnað úr øllum Norðanlondum at koma til Føroyar at vitja fagnaðin, og tiltakið verður tí marknaðarført bæði í Føroyum og uttanlands. Fagnaðurin er eitt gott høvi at knýta bond millum menningartarnað í Norðurlondum, og at skapa eitt fakligt og persónligt netverk millum tey, sum dagliga arbeiða innan økið. Í sambandi við marknaðarføringina er ætlanin at hava eina búmerkjakapping og at prenta T-shirt´s við búmerkinum á. Eisini verður heimasíða við kunningartilfari gjørd.

# Motorsúkklur hittast í Suðuroy

**MC-BOOGIE**
*Tíðindaskriv*



Leygardagin 4. september skipar áhugafelagið Føroya Ellisakfør fyri MC-Boogie í Suðuroy.

Ætlanin var annars at hava tiltakið á Sandoynni í ár, men orsakað av ávísum trupulleikum í samband við fyriskipan, og at Føroya MC hevði ætlanir um ein Suðuroyartúr í ár, valdu vit at sláa hesi bæði tiltøk saman. Vónandi kann so MC-Boogie verða í Sandoy komandi ár.

– Tiltakið í Suðuroy í fjør var so mikið væleydnað, at vit halda, at tað saktans kann endurtakast.

Tað er kanska onkur, ið ikki rættiliga veit, hvat eitt MC-Boogie er fyri nakað.

Hertil kann sigast, at tað í stuttum er at mc-áhugað koma saman ein dag til sosiala samveru og felagskoyring, og síðan til eina felags veitslu um kvøldið, sigur felagið í tíðindaskrivi. Sum vant er MC-Boogie fyri øll mc-áhugað uttan mun til, um tú ert limur í nøkrum felagsskapi ella ikki.

Fyrstu ferð skipað var fyri MC-Boogie var í 1999, tá ið Føroya Ellisakfør hevði vitjan av útlendskum mc-gestum.

Síðan er hetta vorðið eitt afturvendandi tiltak. Eftir at felagið Føroya MC varð stovnað, hava verið tvey tiltøk um árið, har Føroya MC stendur fyri ørðum og Føroya Ellisakfør fyri hinum tiltakinum. Sambært siðvenjuni er fyrra MC-Boogie 1. vikuskifti í mai og seinna 1. vikuskifti í september.

Sum áður nevnt verður tiltakið hesaferð í Suðuroy. Fyri luttakarar norðan fyri Suðuroyarfjørð byrjar tiltakið kl. 10.00, tá ið silgt verður við Smyrli til Drelnes, har luttakarar úr Suðuroy taka ímóti.

Hagani verður koyrt runt í oynni restina av seinnapartinum.

Um kvøldið verður skipað fyri veitslu á Gistingarhúsinum við Á í Øravík. Aftaná verður almennur dansur á staðnum.

Meiri fæst at vita um tiltakið á heimasíðuni hjá Føroya Ellisakførum (www.ellisakfar.com), siga Føroya Ellisakfør í tíðindaskrivi.

# Truckerfestivalur í Runavík

**Aftur í ár verður skipað fyri trucker-festivali í Føroyum – ein festivalur, har lastbilar og aðrir stórir bilar hittast**

**LASTBILAR**
*Tíðindaskriv*



Tiltakið varð fyrstu ferð roynt í fjør, og til at verða fyrstu ferð var tiltakið sera væl eydnað, siga fyrireikararnir. Hesaferð er ætlanin at gera meira gjørt burturúr. M. a verður skipað fyri undirhaldi, onkur kapping verður millum sjafførarnar, okkurt verður til børnini, og so verða steyp latin til teir vakrastu bilarnar. Fimm steyp verða latin. Tað verður soleiðis skipað, at bilarnir verða býttir í fimm bólkar og nr. eitt í hvørjum bólki fær steyp. Kl. 20.30 leygarkvøldið verða steypini handað teimum bilførarunum, ið hava vunnið. Føroya SHELL letur tey fimm steypini, ið verða latin bilførarunum til ognar.

Bólkarnir eru:

1. Trekkjarar
2. Lastbilar
3. Kranabilar
4. Bussar
5. Trailarar

– Umframt alt hetta ynskja og vóna vit eisini at síggja húsbilar (Kampingbilar/vognar) á festivalinum. Hetta er nakað, ið ikki er roynt áður, men fara vit at royna hetta nú fyri fyrstu ferð. Kostnaðurin fyri at luttaka við kampingbilum er kr. 100,00 fyri bilin. Orsøkin til at vit ynskja at síggja húsbilarnar á festivalinum er, at hetta er eisini eitt serligt bilslag, sum føroyingar ikki kenna so nógv til.

Ynskiligt er eisini, at bilførararnir, ið luttaka á festivalinum, høvdu kunna tikið grillir og mat og drekka við, soleiðis at tað ber til at fáa hugnan, meðan tiltakið er í gongd.

Atgongd til tiltakið er ókeypis, men tó fáa tey vitjandi ein atkvøðuseðil við inn, soleiðis at tey vitjandi kunnu atkvøða um vakrasta bilin, í hvørjum bólki sær. Tá ið ein er liðugur at atkvøða, verður atkvøðuseðilin lagdur í ein kassa, har tað síðani verður gjørt upp, hvørjir vinnarnir eru. Til ber at atkvøða tá tiltakið opnar leygardagin kl. 16, og til kl. 20 leygarkvøldið. Kl. 21 fer avdúkingin fram, um hvørjir vinnarnir eru.

Leygardagin 28. august opnar festivalurin kl.16.

Kl. 23 leygarkvøldið spæla Hjalti og vinmenn til dans í støkk-høllini. »Guligans« skipa fyri.

Sunnudagin 29. august er fesivalurin opin frá kl. 14-17.

Endabresturin verður sunnukvøldið kl. 17. Bilarnir verða settir í eina rekkju, (Convoy) har bilarnir síðani fara ein biltúr til Leirvíkar at venda, og aftur til Runavíkar. Tá bilarnir hava snarað runt í Leirvík, fara teir bilarnir, ið skulu til Klaksvíkar, av tá koyrt verður framvið ferjuleguni í Leirvík, og tá komið verður úr Leirvíkstunnilinum til Norðagøtu, fara teir bilarnir sum skulu til Fuglafjarðar, av til Fuglafjørð. Soleiðis heldur leiðin fram. Bilarnir í Gøtu, fara av í Gøtu o. s. v.. Soleiðis minkar (Convoy´in) so við og við, og til seinast verður eingin bilur eftir í rekkjuni.

– Men minnist endiliga til, at tað er ókeypis atgongd til sjálvt tiltakið, siga fyrireikararnir.

Trucker festivalurin er fyri øll, og skulu tit ikki smæðast við at koma á Trucker festival.

Til ber at lesa meir á http://heima.olivant.fo/~pje/index.fo

Heitt verður á allar bileigarar og bilførarar, ið ætla at luttaka á festivalinum, um at melda seg til sum skjótast. Tilmeldingin fer fram á tlf.: 508622 ella á leif@kls.fo

– Vit vóna, at áhugin fyri at luttaka verður eins stórur, ella størri enn í fjør. Tað er bara at melda til, siga fyrireikararnir, sum lata heilsa, at øll eru hjartaliga vælkomnum á Trucker festival.

# Nýggja Keldan í Skálafirði verður nú tikin í nýtslu

**Nógv verður gjørt burturúr, tá tann stóri nýggi samkomubygningurin hjá Kelduni í Skálafirði verður tikin í nýtslu í vikuskiftinum 3. - 5. september**

**SAMKOMA**
*Tíðindaskriv*

Eftir stívliga trý-ára byggiarbeiði, er nú klárt at taka 1. byggistig av nýggja samkomu-bygninginum hjá Kelduni í Skálafirði í nýtslu. Í hesum sambandi verður skipað fyri fest-møtum í vikuskiftinum 3. - 5. september. Á skránni verða almenn møti, bíbliutímar við gestatalarum, og familjumøti. Leygardagin 4. september kl. 17 verður eitt serligt alment møti, har umboð fyri kommunustýrini við Skálafjørðin, løgtings- og landsstýrismenn úr Eysturoynni, og umboð fyri fyritøkur og einstaklingar, ið hava stuðlað bygginginí, eru boðin at verða við.

### Ljóð og ljós á høgum støði

Nógv er gjørt burturúr ljóð og ljósviðurskift-unum í nýggju Kelduni. Hølini eru innrættaði eftir ráðgeving frá serkønum ljóðfólki, og stór ljóð og ljósanlegg eru fingin til vega. Alt hetta sleppur at standa sína roynd á einum sokallaðum »AWAKE« kvøldi, sum verður leygarkvøldið 4. september. Á tí tiltakinum verður nógvur sangur og ymiskar kreativar framførslur.

### Vitjan úr Danmark og Noreg

Í sambandi við vígsluna, fær Keldan vitjan úr Danmark og Noreg. Útlendsku gestirnir verða David Hansen, samkomuleiðari í Ålborg Menigheds Center, Enevald Flåten, samkomuleiðari í Levende Ord í Bergen, og Eivind Frøen, trúboðari úr Noreg.



